Eitt jólaævintýr

Leikarar:

Jólamaðurin _____

Tríggjar nissur *(dreingir)*:

Nissuóli _____

Nissujanus _____

Nissuper _____

Fitt, gomul kona _____

Prinsessa Sólskin _____

Risin Bitristeinur _____

Tvær hirðkonur _____

Tvey trøllabørn _____

Nógv onnur børn, sum leika trøll og nissur.

Eitt sindur um sjónleika-venjing við børnum

Fyrst verður leikurin lisin upp í síni heild. Roynt verður at gera leikin so spennandi hjá børnunum sum gjørligt.

Síðani verður ein mynd vand í senn. Børnini kunnu spæla ein part nakrar ferðir við ongum handriti (improvisatión), har børnini skiftast at hava teir ymsu leiklutirnar. Um lærarin velur »skeivt« fyrstu ferð, kann tað verða trupult at skifta seinni og ikki særa okkurt av børnunum.

Tá ið børnini hava spælt leikin nakrar ferðir og hava *skilt gongdina* í leikinum, verða leiklutirnir ásettir og handrit býtt út. — Nú verður heitt á børnini um at læra seg leiklutin uttanat.

Nú er so at vóna, at børnini sjálv duga at síggja, at summi hóska best til ein leiklut, onnur til onkran annan.

Tað hevur eisini stóran týdning at fáa børnini at skilja, at allir leiklutir eru týdningarmiklir; tey, sum arbeiða aftanfyri á pallinum, har alt skal gerast stundisliga og stillisliga, hava eins stóran týdning og tey, sum standa á palli.

Tað er heldur ikki bara tey, sum siga okkurt beint nú — ella skulu siga nógv í leikinum — sum eru týdningarmikil. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann leggja nógv afturat leikinum, um hann spælir væl í røttu løtu. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann taka nógv frá leikinum, um hann dregur ov nógv eygu at sær, tá ið hann ikki skal.

Fyrstu ferð, ið vant verður rættiliga á palli, skulu børnini læra at arbeiða aftan fyri pallin og ikki larma. Tað loysir seg at brúka nógva tíð til at venja hetta.

Royn skjótast gjørligt at áseta, hvar leikarin skal ganga og standa, tá ið hann skal siga okkurt. Tá festa setningarnir seg betur, og leikararnir vera tryggari.

Ven børnini frá byrjan at venda sær ímóti áskoðarunum, tá ið tey tosa, og at tosa *nógv* harðari og týðiligari, enn tey halda seg skulu.

Hini børnini kunnu fara oman í salin at eygleiða og lurta, um tað hoyrist nóg væl.

Royn at fáa børnini *ikki* at skunda sær. Onkuntíð hevur tað, at steðga á, mest at siga.

Jólamaðurin sigur frá:
Góðan dag øll somul. — Ja, tit kenna meg kanska ikki? Eg eri jólamaðurin, og í dag skal eg siga tykkum eitt ævintýr um eina lítla nissu, ið eitur Nissuper. Síggja tit — á hvørjum ári, tá ið jólini nærkast, so rópi eg allar nissur í heiminum saman á slotti mínum. Eg siti í hvílistóli mínum, meðan allar nissurnar ganga fram við mær, og eg teski inn í oyrað á hvørji einastu nissu okkurt, sum eg fegin vil hava hana at gera áðrenn jólaaftan verður. Nú, tá ið leikurin fer at byrja, síggja tit tríggjar smáar nissur, sum eg beint nú havi sent út í stóru víðu verð at gera nakað, sum skal gerast fyri jól. Ein eitur Nissuóli, ein annar Nissujanus, og hann í miðjuni eitur Per; havið nú serliga eyguni eftir Nissuperi, tí tað er um hann, ævintýrið snýr seg. Ansið nú eftir.

1. partur
Á skóginum

Leiktjøldini eru granntrø, men eingin kavi er, aftast hongur ein silvurmáni. Nissuóli, Nissujanus og Nissuper koma syngjandi og marsjerandi. Nissuóli hevur stóran blankan saks í hondini, Nissujanus stóran posa á herðunum, og Nissuper í miðjuni heldur undir armarnar á hinum báðum. Teir syngja:

Lag: Napoleon var en tapper kriger

Frá jólamanninum vit boð skulu bera.
Vit skundisliga fara um verð,
at nú, tá ið vetur seg til man gera,
brátt jólahátíðin er her.
Á hvørjum ári fyri jól,
tá kaldligt er várt hellisból,
vit bera øllum boð
um nýggja sól.

Nissuper: Nú man vera best, at vit siga hvør øðrum farvæl. Eg kann ikki koma við tykkum longur.

Nissuóli: Ja, tað gerst ikki við. Nissujanus og eg mugu víðari. Vit hava tvey ørindi at útrætta á skóginum.

Nissuper: Sigið mær eitt, hvat er tað, tit skulu gera á skóginum? Hevur jólamaðurin biðið tykkum um at gjørt nakað á skóginum?

Nissujanus: Ja, tað kanst tú líta á, at hann hevur. Sært tú henda posan, sum jólamaðurin bað meg taka við? Hann er smekk-etandi fullur av kava, eg skal breiða kavan út, so alt landið verður kavaklætt. Fyrst fari eg inn í skógin, tí har er so øgiliga vakurt, tá ið alt er hvítt.

Nissuper: *(við Nissuóla)* Men hvat skalt tú brúka handa saksin til?

Nissuóli: Eg fari at taka burtur av øllum jólatrøunum, so tey taka seg betur út. Tað sær so keðiligt út at síggja tey standa og peiggja við ljótum greinum, tá ið fólk koma eftir teimum. — Men hvat hevur jólamaðurin biðið teg um at gera? Tú hevur jú hvørki saks ella posa?

Nissuper: *(erpin)* Tað, sum eg havi at gera, tað er tað, ið ræður mest um av øllum. Eg havi — skal eg siga tykkum — fingið tey boð, at gera øll menniskju glað, hvar eg so komi, og eg fari at byrja her. *(hyggur seg um)* Veit nakar av tykkum, hvat hatta stóra, fína húsið uppi í brekkuni er?

Nissuóli: Ja, tað veit eg. Hatta er kongsins slott.

Nissuper: Há, há, tað ljóðar spennandi. Jamen, so haldi eg, at eg fari at byrja við kongsins slotti. Farvæl tit báðir — eg takki fyri, at tit fylgdu mær á leið.

Nissuóli og Nissujan.: Farvæl, farvæl. *(út)*

Millumleikur

Jólamaðurin sigur frá:
Ja, nú fer Nissuper gangandi niðan á kongsins slott. Har býr kongur við dóttur sínari, hinari fittu prinsessuni Sólskin, og hann heldur sjálvandi, at tað er sum fótur í hosu at fáa tey á kongsins slotti í gott lag, tí hvat hava tey at kúra og stúra fyri? Men har mistekur Nissuper seg — og tað illa; tí tað vísir seg, at øll á kongsins slotti eru ógvuliga syrgin, og hví — ja tað skulu tit nú sleppa at hoyra. Nú eru vit inni í kamarinum hjá prinsessuni á slottinum, og tvær hirðkonur hennara sita og práta.

2. partur
Hjá prinsessuni á slottinum

1. og 2. hirðkona sita og práta, meðan tær baldýra.

1. hirð-kona: Nei, veitst tú hvat – her er sanniliga ikki so stuttligt, sum eg helt, tá ið eg kom higar. Haðani eg komi, hevur kongurin í minsta lagi eina veitslu um vikuna á slottinum, har øll tey fínu í ríkinum verða boðin við.

2. hirð-kona: Áh, tú kanst líta á, at í gomlum døgum var eisini gaman og gleimur her. Men nú eru vit øll somul so bangin, at her er eingin, sum hugsar um at gera veitslu ella dansa um jólatræið.

1. hirðk.: Bangin, hví eru tit bangin?

2. hirðk.: Tað er hasin Bitristeinur.

1. hirðk.: Bitristeinur, hvør í víðastu verð er tað?

2. hirðk.: Bitristeinur er ein risi, eitt av hasum stóru, ljótu trøllunum, ið hevur styrki sum 1000 menn. Tað eru tvey ár síðani nú, hann kom higar til landið og bygdi sær eitt slott uppi á fjallinum stutt frá býnum. Tað er eitt merkiligt slott, tí tað var bygt eftir einari nátt, og tað er næstan størri enn kongsins slott.

1. hirðk.: Uh, sum tað ljóðar stuttligt.

2. hirðk.: Stuttligt. Tú tosar, sum tú hevur vit til. Nei, tað er ikki stuttligt, skal eg siga tær, tí fingu fólk skjótt greiði á. Bitristeinur kravdi beinan vegin av fólki, at tey skuldu bera honum gávur, og øll noyddust at geva tað, ið hann kravdi, annars gandaði hann allar verðsins ólukkur oman yvir tey.

1. hirðk.: Tað var jú ræðuligt.

2. hirðk.: Ja, men tað versnaði so stórliga. Tí hevði Bitristeinur bara kravt mjøl og kjøt og súrepli av fólki, so kundi tað kanska gingið. Men fyri nøkrum mánaðum síðani hevði Bitristeinur á orði, at hann fegin vildi giftast.

1. hirðk.: Og hvørjum vildi hann giftast við?

2. hirðk.: Ja, men tað er júst tað, ið er so burtur úr vón og viti. Hann vil hava prinsessuna, og hann skilaði til, at fekk hann ikki prinsessuna, so skuldi hann eta alt tað fólk, í landinum var.

1. hirðk.: Men hvat sigur kongurin? Hann kann ikki...

2. hirðk.: Kongurin gjørdist sjálvandi ógvuliga tungur í huga, tá ið hann hetta hoyrdi, tí hann vildi jú ikki, at hansara fitta prinsessa skuldi giftast við hasum ljóta risanum. Hann savnaði tí stóran her saman og skuldi herja á Bitrastein. Men Bitristeinur blásti bara eitt sindur á teir, so reyk allur herurin um koll, og eingin kundi røra seg, fyrrenn Bitristeinur einaferð læt teir sleppa at renna heim aftur.

1. hirðk.: Og hvat so?

2. hirðk.: Ja, so er ikki stórt meira at siga. Í dag er sjálvur kongurin farin saman við fylgi sínum at tosa Bitrastein upp í lag og fáa hann at skifta meining og ikki giftast við prinsessuni. Men um tað eydnast, tað er ikki gott at vita.

1. hirðk.: Veit prinsessa Sólskin nakað um alt hetta?

2. hirðk.: Nei, eingin hevur havt hjarta at sagt henni nakað — øll halda tað vera so synd, at hon skal ganga og stúra fyri at giftast við hasum ljóta trøllinum.

1. hirðk.: Hysj, latum okkum ikki tosa meira um hatta. Har kemur prinsessan.

Prinsessa Sólskin kemur inn. Hirðkonurnar níga djúpt.

Prinsessan: Ná, her sita tit og baldýra. Hvat er hatta, tit seyma? Jólagávur, kanska?

Hirðkonurnar: *Níga djúpt, svara ikki.*

Prinsessan: Tað er merkiligt. Bara eg nevni jól ella jólatræ ella jólagávu, so suffa øll menniskju og svara mær ikki aftur. Um tað bara hevði verið ein einasti, ið hevði viljað sagt mær, hví tað er so, haldi eg fyri vist, at alt hevði verið so nógv lagaligari. Eg eri viss í, at tað er bara eg í øllum ríkinum, sum ikki veit, hví tit eru so stúrin. Hoyr, er tað eingin, ið kann siga mær, hvar pápi er farin? Eg hoyrdi sum slatur í gjáramorgun, at hann var farin at ferðast, men eingin visti, hvagar hann fór, ella nær hann kom aftur.

2. hirðk.: Nei, spyr ikki meg, eg dugi einki at siga tær. Eg haldi meg hava hoyrt, at ráðharrarnir væntaðu Hansara Hátign at koma á ráðharratingið fyrrapartin í dag.

Prinsessan: *(rennur í vindeygað)* Áh, nú kemur vognurin hjá pápa *(ljóð av vogni)* So man hann fara at koma higar niðan at heilsa uppá meg.

Róp úti: Hansara Hátign Kongurin! Hansara Hátign Kongurin!

Kongurin: *(Kemur inn við gullkrúnuni eitt sindur á skák)* Góðan dag, mítt kæra barn. *(Hirðkonurnar níga, prinsessan loypur um hálsin á honum og kyssir hann)*

Prinsessan: Góðan dag, lítli pápi, hvar hevur tú verið? Eingin hevur viljað sagt mær nakað. Tey dylja okkurt fyri mær.

Kongurin: Hvar eg havi verið? Ja, hm..... sært tú, mítt fitta barn. Tað er júst tað, eg ætli mær at tosa við teg um. Eg havi verið hjá risanum Bitrasteini.

Prinsessan: Oy oy — men hví hevur tú verið hjá tí ljóta jassinum?

Kongurin: Jú, sært tú, eh... Tað liggur soleiðis fyri, skilir tú, at Bitristeinur vil giftast.

Prinsessan: *(flennir hart)* So noyðist hann at leita sær í telefonbókini eftir einari konu. Tað er eingin, sum skoytir um hann.

Kongurin: Ja, hm — jú, sært tú, tað liggur soleiðis fyri — nú fari eg at biðja teg um at vera ein røsk og skilagóð genta, lítla Sólskin — og gera, sum pápi tín sigur. Bitristeinur vil giftast við tær, skilir tú.

Prinsessan: So! Men eg vil hvørki hava hann ella síggja hann.

Kongurin: Eg frykti fyri, at tú mást hava hann, um tú vilt ella ikki. Annars sorlar hann allan býin sundur og etur alt fólkið í landinum — eisini teg og meg.

Prinsessan: Hevur tú givið honum títt jaorð, nú tá ið tú vart uppi á slottinum hjá honum?

Kongurin: Eg noyddist, mítt neyðars barn. Tú mást offra teg fyri faðir tínum og fyri landi tínum. Eg mátti skriva undir á ein seðil, har tað stóð, at tú skuldi giftast við Bitrasteini, og seðilin er skrivaður við risablóði, so lyftið kann ongantíð brótast.

Prinsessan: *(fer at gráta)* Og nær hevur tú lovað honum, at brúdleypið skal standa?

Kongurin: Á seðilinum stendur, at tú skalt giftast við honum, tá ið seinasta blóman í urtagarði hansara er følnað.

Prinsessan: Og nær verður tað, heldur tú?

Kongurin: Tja — tá ið eg gekk gjøgnum urtagarðin, var líkt til, at har var bara ein lítil baldursbrá eftir, og hon man skjótt fara at følna, tí kuldi er í luftini, og menn væntað kava. So í morgin man tað fara at verða.

Prinsessan: Ja, eg eri tann ólukkuligasta lítla prinsessan í verðini. Og eg, sum helt, at eg fór at giftast við einum fittum, ungum prinsi, og so skal eg vera kona Bitrastein. *(setist í ein stól og grætur. Hini sleppa sær ljódliga út, tá ið tey hava gjørt tekin hvør til annan um, at prinsessan helst vil vera einsamøll)*

Nissuper: *(kemur ljódliga inn og steðgar bilsin, tá ið hann sær prinsessuna gráta, prikar hana í armin)* Hvussu eitur tú?

Prinsessan: Eg eiti prinsessa Sólskin. *(grætur aftur)*

Nissuper: Ja, so, navnið hóskar ikki so væl í løtuni. Tað hevði kanska verið meira hóskandi, um tú æt prinsessa Ælaveður.

Prinsessan: Eg gráti, tí eg skal giftast við Bitrasteini.

Nissuper: Bitrasteini? — — Hvør er Bitristeinur?

Prinsessan: Bitristeinur er ein risi, ið eigur eitt slott uppi á fjallinum. Hann er gamal og ljótur, og eg gráti, tí hann vil hava meg til konu...

Nissuper: Men tá ið tú einki leggur í hann, hví sigur tú so ikki, at tú vilt ikki hava hann?

Prinsessan: Tað ber ikki til, tí pápi mín hevur skrivað undir, at Bitristeinur skal fáa meg — annars etur hann alt fólkið í landinum er. Og seðilin er skrivaður við risablóði, so ikki ber til at bróta lyftið. Og tí kemur Bitristeinur kanska eftir mær longu í morgin.

Nissuper: Hví longu í morgin?

Prinsessan: Jú, tí tað stendur á seðilinum, at brúdleypið skal standa, tá ið síðsta blóman í risans urtagarði er følnað. Og har stendur bara ein lítil baldursbrá eftir — skjótt fellur hon niður, og so kemur Bitristeinur, og so noyðist eg avstað við honum. *(grætur aftur hart)*

Nissuper: *(klappar henni á kjálkan)* So, so, nú skalt tú ikki gráta. Hetta man fara at laga seg. Vit skulu altíð vóna tað besta, og eitt skalt tú vera glað um, og tað er, at tað netupp var eg, sum kom henda vegin. Tað, ið eg skal siga og ikki lúgva, er tað, at eg eri sendur út í heimin at gera fólk glað til jóla *(turkar tár hennara við lummaturriklæðnum)*

Prinsessan: Heldur tú, at tú kanst gera okkurt?

Nissuper: Ja, tað kann eg siga tær. Far tú nú og legg teg, so skal tú skjótt frætta okkurt. Lít á míni orð. Farvæl, lítla. *(Út høgrumegin, prinsessan verður standandi og veittrar.)*

TJALD

Jólamaðurin sigur frá:
Tá ið Nissuper hevði lovað at hjálpt prinsessuni, skundar hann sær út í skógin til mín — og so løgdu vit báðir høvur í blot. Eg lænti honum sletuna hjá mær. Hann klatraði upp í hana og hugdi hvørki til høgru ella vinstru. »So fara vit,« rópti hann — og so skreiddi hann. Men haldið ikki, at sletan fór beina leið eftir vegnum, sum vanligar sletur, nei, henda gjørdi fyrst eitt lop, so eitt annað og helt so beina kós beint upp í loft. Hægri og hægri fór hon, upp gjøgnum skýggini, fram við mánanum, ið smíltist við sínum stóra, gula andliti, og Nissuper veittraði til hansara við húgvuni, tá ið hann fór framvið. Endiliga kom hann hagar, ið stjørnurnar grógva, so tættar sum summardáar á einum teigi ein várdag. Nissuper bresti við einum koyrli, og sletan steðgaði. Í einum lopi var hann av sletuni, og so legði hann seg á knæ og fór at henta. Hann hentaði alla sína reyðu topphúgvu fulla av stjørnum — einar hundrað; so fór hann aftur á sletuna og bað hana skreiða heim. Hvat halda tit, Nissuper ætlaði at brúka stjørnurnar til? Jú, hann hevði funnið upp á ráð. Nú skuldi Bitristeinur lumpast. Ímeðan gekk Bitristeinur á slottinum og mól og gleddi seg til, at seinasta baldursbráin skuldi følna, so hann kundi fara eftir prinsessu Sólskin. Ansið nú eftir, tí nú eru vit í risans urtagarði. Risin er eingin vøkur sjón, men ræðist hann ikki kortini, tí minnist til, hetta er bara skemt og stuttleiki alt samalt. Og eisini er Nissuper í námindum alla tíðina, og hann man ansa eftir tykkum. Lítið á tað.

3. partur
Urtagarðurin hjá Bitrasteini

Tvey smá trøll standa framman fyri einum blomstri aftast í leiktjøldunum og hyggja gjølla at.

1. trølladrongur: Ná, nú fer brúdleypið skjótt at standa, tað síggi eg.

2. trølladrongur: Ja, nú er lítið gott eftir av hesum blomstrinum. Heldur tú, at eg kann pilka eitt sindur við tað?

1. trølladr.: *(bangin)* Nei, ert tú púra ørur í høvdinum. Bitristeinur drepur, um tú nertur við, hann vil, at alt skal ganga rætt og sámiligt fyri seg hesa ferð. Og eg eri urtagarðsmaður, so tað eri eg, sum havi ábyrgdina.

2. trølladr.: Ná, men eg kundi hugsað mær at sæð hasa baldursbráina følnað eitt sindur skjótari, men av tí at Bitristeinur er so strangur, so er best einki at gera. Á vælsignað, nú kemur Bitristeinur.

Bitristeinur: *(kemur inn og gongur og válar í øðini, sveiggjar við halanum)* Huh-tu-tu — eg eri í ringum lag í dag. Hatta var ein vána morgunmatur, tey góvu mær.

1. trølladr.: Mín stóri og ediligi harri átti annars at verið í góðum lag, tí brúdleypið er beint fyri durum.

Bitristeinur: *(blíðari)* Brúdleypið. — Ja, tú sigur nakað. — Nú man tað fara at vera skjótt, tá ið eg skal fara eftir lítlu fittu prinsessu Sólskin. Kanska um einar tveir dagar.

1. trølladr.: So leingi er tað sanniliga ikki neyðugt hjá tygum at bíða. Skal eg siga tygum satt, so kann brúdleypið standa longu í dag.

Bitristein.: Í dag — nei, hvat er tað, tú sigur. Eru øll blomstrini.....

1. trølladr.: Um Hansara Hátign vildi gjørt so væl at hugt, so, *(peikar á blómuna)* har stendur tann seinasta; hon stendur ikki meir enn nakrar tímar afturat, so frægt dugi eg á at skyna.

Bitristein.: Há, há, tað var einastandandi. So kann eg giftast longu í dag. Hví fari eg so ikki eftir henni beinan vegin? Hon verður helst glað, tá ið hon sær sín prúða og fitta brúðgóm. *(við 2. trølladrong)* Verð

tú sitandi her og ansa mær so væl eftir blomstrinum, at eingin nertur tað. Tá ið tað er følnað, skjót so við teirri stóru kanónini framman fyri slottið, so vit hoyra, nær brúdleypið skal byrja. *(fer út vinstrumegin)*

1. trølladr.: *(setur seg hjá blomstrinum)* So nú ræður um at ansa væl eftir, nær tað følnar. Spell bara, at eg altíð vil so ræðuliga illa sova, tá ið eg siti einsamallur *(geispar)* — Uh, sum tað er keðiligt ongan at hava at tosa við — man tað bila, um eg taki mær ein lítlan lúr, meðan eg bíði eftir, at okkurt skal henda? *(leggur seg og sovnar)*

Nissuper: *(kemur ljódliga inn, hann hevur húgvuna fulla av stjørnum í hondini)* Ná, tað var heppið, at hasin sovnaði — eg má jú yvir til blomstrið, sum hann eigur at ansa eftir. Síggja tit hesa húgvuna — hvat halda tit er í henni? Á tað munnu tit vita, man jólamaðurin ikki hava sagt tykkum tað? — Eg havi stjørnur, sum eg havi hentað uppi í himlinum, og nú hevur jólamaðurin sagt, at eg skal planta stjørnurnar undir kavanum í urtagarðinum hjá Bitrasteini, so skuldi verið glymurdansur. *(lúrir seg yvir til blomstrið og plantar stjørnurnar har)* So, nú er tað gjørt, nú kann Bitristeinur koma við prinsessuni, um honum lystir — hann verður bilsin, einki er so vist sum tað..... *(Nissuper fer út høgrumegin)*

Næstan í somu løtu hoyrist gangur uttanfyri. Hin lítli sovandi trølladrongurin rýkur á føtur, gníggjar eyguni og hyggur ørkymlaður um seg. Men tá ið hann hevur hugt at blomstrinum og sæð, at alt er í lagi, ger hann seg til at taka ímóti Bitrasteini.

Bitristeinur við øllum sínum fylgi, so nógv smá tröll, sum gjørligt. Tey hava langan hala við reyðari sloyfu og dansa runt um Bitrastein og eru kát — Bitristeinur leiðir prinsessuna.

Bitristein.: Ná, so eru vit her, mín vakra. Hygg teg nú væl um.

Prinsessan: Ikki ber til at siga annað enn, at her er vakurt. Hu-hu — hygg hasin urtagarðurin. — Tað kylir ígjøgnum meg, so óhugnaligan haldi eg hann vera. Tað er nógv vakrari niðri á slottinum hjá okkum.

Bitristein.: Tað er líka gott, at tú gevst við hasum svassinum beinanvegin, tí nú býrt tú *her,* og her verður ikki vakrari, at tú veitst tað.

1. trølladr.: *(kemur yvir til Bitrastein)* Kundu Tygara Hátign sagt mær, hvussu brúdleypsmáltíðin skal vera — — — *(teir teska, ímeðan kemur prinsessan fram á pallin, hon hyggur um seg alla tíðina)*

Nissuper: *(stingur høvdið inn gjøgnum leiktjøldini høgrumegin)* Psst.....

Prinsessan: Áh, ert tú har — tað var óført. — Eg var farin at óttast, at tú kanska hevði gloymt at hjálpa mær.

Nissuper: Nei, tað havi eg so sanniliga ikki. Bíða eitt sindur, so skalt tú síggja, at eg ikki havi gingið fyri einki og malið. Eg fari út aftur. Tað er ikki vert, at Bitristeinur ber eyga við meg *(rýmir út høgrumegin)*

Bitristein.: Halloy hon sjálv — prinsessan. Statt ikki har og gána. Tú skalt stuttleika tær í dag, unnustan mín. Minst til, at hetta er brúdleypsdagur okkara. Men hvør var hasin, tú stóð og tosaði við?

Prinsessan: Eg tosaði ikki við nakran — kanska við meg sjálva, men ongan annan. Tú manst hava sæð yvir teg. Hvør av teimum, sum eg kenni, heldur tú, hevði torað at komið niðan á fjallið til mín? — — Tú við øllum tínum gandakynstri.

Bitristein.: Tað er nakað um hatta, tú sigur. — Tey ræðast meg, fólkini niðri í býnum. Jú, tey ræðast meg — øll somul.

Prinsessan: Tað kundi kanska verið, at har var onkur, ið ikki ræddist teg.

Bitristein.: Hvør skuldi tað verið?

Prinsessan: Eg til dømis. Nú, ið eg rættiliga havi sæð, hvussu stórur, ljótur og tjúkkur tú ert, ræðist eg teg als ikki — ikki petti. Eg vil yvirhøvur ikki giftast við tær, at tú veitst tað.

Bitristein.: Tað ræður tú ikki fyri. — Tú mást, tí tað stendur á seðlinum, sum kongur sjálvur hevur skrivað undir, og tað er prentað við risablóði, so tað heldur í allar ævir — tú *skalt* vera kona mín.

Prinsessan: Ja, tað heldur tú. Og eg skal eisini gera, sum tað stendur á seðlinum og verða kona tín, men ikki fyrr enn seinasta blóma í urtagarði tínum er følnað. Ikki fyrr.

Bitristein.: So tú heldur, at tú kanst mala uttanum soleiðis. Nei, vælsignað, tað gongur ikki. Hin seinasta baldursbráin var næstan følnað, tá ið eg fór oman eftir tær, og nú man hon vera fallin — Farið burtur frá, hirðfólk mítt, so mín vakra brúður sjálv kann síggja, at seinasta blóman í urtagarðinum er følnað. *(Hirðfólkini, ið alla tíðina hava fjalt blomstrið, fara til viks, og nú sæst, at baldursbráin er í glitrandi blomstrum, jólastjørnan.)*

Prinsessan: *(flennir)* Sum tíni blomstur eru vøkur, Bitristeinur. Visti tú tað?

Bitristein.: *(veipandi í øðini)* Hvør hevur volt mær hetta skálkapuss? Hvussu ber hetta til? Tað er so kalt, at *bara himmalsins stjørnur høvdu kunnað vaksið og blómað á jørðini.*

Nissuper: *(kemur fram undan leiktjøldunum)* Rætt hevur tú, tí fór eg eisini upp á vetrarbreytini eftir stjørnum, fylti húgvuna og plantaði tær her. Nú verður einki av brúdleypinum hjá tær.
(Bitristeinur stendur eina løtu og bínir at jólastjørnunum. So gevur hann eitt ýl frá sær og loypur upp í loft. Í somu løtu slóknar ljósið, og ein pappírsposi verður brestur. Tá ið ljósið kemur aftur, standa prinsessan og Nissuper eina eftir á pallinum)

Prinsessan: Oy, oy, hvar fóru tey?

Nissuper: Hoyrdi tú ikki brestin? Tað var Bitristeinur, ið brast av øði. Nú flýgur hann í tíggju túsund smáum pettum einastaðni millum heims og heljar. Risar bresta, tá ið teir verða í øðini.

Prinsessan: Men hvar fóru hini trøllini?

Nissuper: Ja, tey eru eisini horvin. Tey vóru jú bara gandur og vóru bara til, so leingi harri teirra var til. Men tey blomstur, ið vuksu upp úr stjørnunum, sum eg plantaði, skulu hereftir eita jólastjørnur, og hvørja ferð, jólini nærkast, skulu tær spretta upp alla staðni, og tá ið børnini so síggja tær, skulu tey minnast Nissuper, ið lumpaði risan Bitrastein.

Prinsessan: Og fekk prinsessuna og helvtina av ríkinum afturfyri,

Nissuper: Hvat sigur tú?

Prinsessan: Jú, eg segði við pápa, at tú hevði lovað at hjálpt mær, og hann segði, at kundi tú lumpa risan Bitrastein, so skuldi tú fáa meg og verða kongur. — Kom, lat okkum fara oman í býin — skunda tær. — Neyðars pápi, hann situr og grætur eftir mær, so gullkrúnan er dottin niður á annað oyrað. — Sum hann verður glaður, tá ið hann sær, at einki er hent mær. So kunnu vit halda brúðarveitslu og jólaveitslu sama dag. *(tey leiðast og renna út høgrumegin)*

4. partur

Brúdleypið hjá Nissuperi og prinsessuni, salur á slottinum

Á trónuni situr Nissuper við krúnu um reyðu húgvuna, og prinsessan í veitslubúna við stórum blómutyssi av jólastjørnum í hondini — frammanfyri hin gamli kongurin og so nógvar nissur, sum gjørligt.

Nissuper: *(reisist)* Kvinnur og menn! Við tað at eg í dag eri so eydnuríkur at kunna halda brúdleyp við vakrastu prinsessu í heiminum, prinsessu Sólskin, er tað mær ein serlig gleði, at eg havi kunnað boðið øllum mínum kæru nissuvinum við í brúdleypsveitsluna, sum jú samstundis er jólaveitsla. Og eg lovi tykkum øllum, at Nissuper skal ongantíð gloyma tykkum, hóast hann kemur til spekt og prýði og verður kongur í øllum landinum. Eg fari beinan vegin at gera eina lóg, sum sigur, at tað á øllum loftum jólaaftan skal standa eitt fat av lambasteik og brúnkaðum eplum. Í mínum landi skulu nissurnar altíð liva væl. Lítið á tað.

(Nissurnar syngja)

Prinsessan: Takk, túsund takk øll somul. Sum tit eru fitt. Tí havi eg nakað, at gera tykkum bilsin við. *(klappar. Tendrað jólatræ verður borið inn)* Nú taka vit saman hendur um jólatræið. Og so biðja vit allar okkara smáu vinir niðri í salinum syngja saman við okkum, so hart, sum tit orka. Komið nú.

(Nissuper, prinsessan, kongurin og allar nissurnar dansa um jólatræið og syngja): Stuttligt er um jólatræ.